# Frágreiðandi og vegleiðandi tekstur

Her verður greitt frá frágreiðandi og vegleiðandi teksti.

**Frágreiðandi tekstur**
Í einum frágreiðandi teksti fáa vit at vita, hví og hvussu okkurt hendir, og hvussu tað fer fram. Frágreiðandi teksturin er í fýra stigum:

1. **stig** – yvirskrift
2. **stig** – framløga ella miðling av vitan
3. **stig** – frágreiðing um arbeiðsgongdina ella hendingina
4. **stig** – samanumtøka ella samandráttur.

Setningarnir í tekstinum verða bundnir saman við sambindingarorðum, sum antin hava okkurt við tíðina at gera, t.d. *tá, tá ið, inntil, síðan* ella hava okkurt við orsøkina at gera, t.d. *tí, tí at, so, av tí, av tí at, soleiðis at*.

**Vegleiðandi tekstur**
Ein vegleiðandi tekstur er eitt slag av uppskrift, sum vísir, hvussu vit skulu gera okkurt ella røkka einum ávísum máli. Hann er í fýra stigum:

1. **stig** – yvirskrift
2. **stig** – tilfar ella annað, sum skal brúkast
3. **stig** – arbeiðsgongdin
4. **stig** – samanumtøka, t.d. við einari eftirmetandi viðmerking.

2. stig er ofta ein listi, og 3. stig er ofta sett upp í punktum. Setningarnir eru tí sjáldan bundnir saman.











Nem í sætta síða 140, 142